TIL **ARBEIÐIS**



FAKTA **BRYNHILD**

**Navn:** Brynhild Joensen

**Starv:** Eigari av blómuhandli

**Besta við starvinum:** At skapa

**Ringasta við starvinum:** Alt tað ivasama

**Starvstíð:** 28 ár

**Lívsstarv:** So avgjørt

**Starvsfólk:** Fýra

**Staður:** J. C. Svabosg. 10, Tórshavn

**Stjóri:** Eg sjálv

MYND: ÁLVUR HARALDSEN

# MERKISDAGAR OG JARÐARFERÐIR GEVA MEST ARBEIÐI

ÁÐUR VÓRU PÁSKIRNAR TANN HÁTIÐIN, TÁ IÐ **BLÓMUHANDLARNIR** SELDU MEST. VEÐURLAGSBROYTINGARNAR GERA, AT **PÁSKALILJURNAR** SPRETTA NÓGV FYRR, SO FÓLK HAVA SÍNAR EGNU BLOMUR Á PÁSKUM. NÚ ER MEST HJÁ BLÓMUHANDLUNUM AT GERA, TÁ IÐ **MERKISDAGAR** OG **MÓTTØKUR** ERU, SIGUR **BRYNHILD JOENSEN**, LEIÐARI Í BLÓMUHANDLINUM **ÁRSTÍÐUNUM** Í HAVN



**TIL ARBEIÐIS**

**Randi Jacobsen**
randi@sosialurin.fo

Henda dagin vit hitta Brynhild Joensen í blómuhandinum Árstíðunum, arbeiðir hon har sjálv. Tær eru vanliga fýra, men henda dagin hava tvær forfall, so nógv er at gera.

Tær hava júst latið seinastu kransarnar og blómutyssini til eina jarðarferð, og ein jarðarferð stendur fyri. Telefonin kimar, og samstundis koma fólk inn at keypa blómur.

Handilin er á tremur við blómum, sum anga væl.

Brynhild Joensen arbeiddi sum sjúkrahjálpari, tá ið hon fyri 28 árum síðan gjørdi frítíðarítriv sítt til starv og læt upp blómuhandilin Árstíðirnar í J. C. Svabosgøtu í Havn.

– Tað er eitt spennandi arbeiði, tí vit vita ongantíð, hvat dagurin hevur at bjóða. Tað er eisini spennandi at skapa, og serliga stuttligt er at fáa positivar viðmerkingar, tá ið vit hava gjørt okkurt vakurt, sigur Brynhild, sum heldur tað vera eina serliga stóra avbjóðing at gera blómutyssi til brúðarpør og pynta við blómum til brúdleyp. Tá má einki ganga galið.

Hinvegin er arbeiði eisini strævið, tí tær hava ongantíð frí, og tað eru serliga ávísar hendingar, sum geva arbeiði.

– Vit hava mest at gera, tá ið tað eru merkisdagar, fyritøkur hava móttøku, og so tá ið jarðarferðir eru, sigur Brynhild Joensen.

## Fleiri broytingar

Nógv er broytt, síðan hon byrjaði fyri 28 árum síðan, tí tá komu ofta tey somu fólkini og keyptu sær blómur til vikuskiftið. So er ikki meira. Ein orsøk kann vera, at fólk spara, men fleiri og fleiri fólk hava fingið sær urtagarð við nógvum blómum.

Ein onnur stór broyting er, at áður vóru páskirnar tann stóra hátíðin hjá blómuhandlunum.

– Veðurlagsbroytingarnar hava havt við sær, at páskaliljurnar nú blóma ein mánað fyrr, enn fyri nøkrum árum síðan. Tí hava fólk, sum hava urtagarð, egnar páskaliljur at taka inn á páskum, sigur Brynhild Joensen.

Tá ið tær skulu bileggja blómur, fylgja tær væl við í útvarpi og í bløðunum, nær merkisdagar eru, og nær jarðarferðir eru. Tað tekur tveir dagar at fáa avskornu blómurnar, sum allar koma úr Hollandi, til Føroya. Blómurnar koma allar við flogfari, planturnar við skipi. Tað ber ikki til at keypa niðurfyri, tí avskornu blómurnar hava kki so langa livitíð.

– Fólk ilskast inn á, at blómurnar eru so dýrar, men tað má vera so, tí kostnaðurin fyri flogfrakt er so høgur, sigur Brynhild Joensen.

Fyri tveimum árum síðani umhugsaði hon at gevast við handlinum, men gjørdi tað ikki kortini. Hon hevur nú ongar ætlanir um at gevast, tí hon trívist so væl millum allar blómurnar.